Ítróttar
# Sosialurin

Nr. 82 • fríggjadagur • 28. apríl 2006 • 80. árgangur • www.sosialurin.fo

## Tølini tala

| | 05 | 05 | 04 | 03 | 02 | 01 | 00 | 99 | 98 | 97 | 96 | Í alt | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| HB-B36 | 1-1 | - | 1-0 | 1-2 | 1-2 | 1-2 | 2-2 | 4-2 | 2-3 | 1-0 | 3-1 | 4-2-4 | 17-15 |
| ÍF-VB/S | 3-3 | - | 1-0 | - | - | - | - | 1-2 | 2-5 | 0-3 | 0-0 | 1-2-3 | 7-13 |
| EB/S-Skála | 0-1 | 0-0 | 0-1 | 1-0 | 1-0 | - | - | - | - | - | - | 2-1-2 | 2-2 |
| GÍ-NSÍ | 1-5 | 0-0 | 1-1 | 1-1 | 0-2 | 0-1 | 1-0 | 1-3 | 5-1 | 2-0 | - | 3-3-4 | 12-14 |
| B68-KÍ | - | - | 1-1 | 3-1 | 2-0 | 4-0 | 6-1 | 2-3 | 1-5 | 1-2 | 0-4 | 4-1-4 | 20-17 |

## Superligan ov vánalig

**Orsøkin til, at FCK og Brøndby eru langt frammanfyri hini liðini í donsku superliguni, er, at fleiri feløg hava lægri støði enn vanligt, heldur danskur venjari**

FÓTBÓLTUR

*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Keld Bordinggaard, sum seinnu árini hevur verið hjálparvenjari hjá Morten Olsen á danska fótbóltslandsliðnum, heldur at støðið í bestu donsku fótbóltsdeildini er ikki nóg høgt.

FC Keypmannahavn og Brøndby liggja langt frammanfyri øll hini feløgini í superliguni, men Bordinggaard heldur ikki, at hesi bæði feløg eru blivin so nógv betur enn hini feløgini. Heldur er tað, at liðini aftanfyri eru blivin verri.

– Vit mugu vera erlig og siga, at superligan er ikki so góð í ár. Tað eru ov nógv lið, sum ikki hava funnið rætta støðið. Tí mugu vit ikki halda, at FCK og Brøndby eru blivin so nógv betur enn hini liðini, sigur Keld Bordinggaard við Jyllands-Posten.

# Tony eigur síðsta sigurin á Toftum

**Tað verður roknað við, at ósigraða KÍ fer at hava heilt nógvar áskoðarar við sær út á Svangaskarð, har heimaliðið leingist eftir størri úrtøku**

B68-KÍ

*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*

Fótbóltshugaðir klaksvíkingar eru í góðum hýri. Teirra lið er tað einasta, sum higartil ikki hevur tapt í landskappingini, og sunnudagin verður tað lagaligari hjá KÍ viðhaldsfólkunum at fylgja sínum liði á útivølli, enn tað nakrantíð áður hevur verið tað.

KÍ skal spæla á Svangaskarði. Í Klaksvík verður tað roknað við, at nógv KÍ viðhaldsfólk fara at møta upp á Toftum:

– Tey skulu vera hjartaliga væl komin. Vit vóna, at tey vera í góðari tíð. Kanska fer bilastreymurin at minna ikki so sørt um streymin, soleiðis sum hann er, tá ið landsdystir eru á skránni. Vit eru væl fyrireikað, og hetta verður eingin trupulleiki. Um áskoðararnir koma í góðari tíð, so verður tað uppaftur meiri lagaligt, sigur B68 formaðurin, Niclas Davidsen, sum hevur brynjað seg við fólki at leiðbeina bilførarunum við parkeringini.

Spurningurin er so, hvussu tað fer at hilnast á vøllinum. Hóast avrikini hjá B68 hava verið lutfalsliga góð, so er ikki so nógv í stigaposanum. Tað er greitt, at hollendski miðvallarin, Ralph van Dooren, ikki verður á B68 liðnum sunnudagin. Hann er leikbannaður eftir útvísingina í Gundadali leygardagin.

B68 liðformaðurin og verjuálitið, Arnbjørn Danielsen, er ivasamur. Hann hevur trupulleikar í rygginum. Arnbjørn var ivasamur undan B36 dystinum, men hann spældi kortini. Síðani hevur hann ikki vant við fullari ferð.

### Sjey ár síðani seinasta sigurin

KÍ plagdi at megna góð úrslit á Svangaskarði. Tað hava teir tó ikki gjørt tey seinastu árini. Seinasti KÍ sigurin á Toftum var í 1999, ella tá ið Tony Paris og KÍ vunnu 3-2 og seinni FM heitið. Síðani hava klaksvíkingar tapt tríggjar ferðir og spælt eina ferð javnt á útivølli móti B68. Ivaleyst komast KÍ áskoðararnir við 3-2 sigurin í 1999. KÍ var á odda 3-0 á grasvøllinum. So vórðu fleiri skiftingar gjørdar, rútman fór úr liðnum, B68 fekk síðstu løtuna um endan. Teir minkaðu tvær ferðir um munin, og tað var um reppið, at toftamenn megnaðu at stríða seg upp á javnt!

Høgni Madsen er tøkur aftur hjá KÍ, eftir at hann var leikbannaður móti VB/Sumba. Ovi Nysted og Jan Andreasen hava verið eitt sindur ódrúgvir í venjingini í hesi vikuni. Tað verður tó roknað við, at teir fara at vera við á Toftum sunnudagin.



*Fyrsti dysturin hjá Formulaliðnum hjá KÍ, eftir at Norðoyatunnilin er latin upp, verður á Svangaskarði sunnudagin. Roknað verður við, at nógv fólk fer við KÍ til Toftir*




Opi : Mánadag - fríggjadag kl. 9.00 - 17.00
annars sambært avtalu
***Vøruskrá kann fáast!***

LIT&STÍL

Móti varðar 3 mánaðar!
Stílur varðar alt lívið!

Ynskir tú eina broyting?
blív sum nýggj við LIT&STÍL

Tú fært:
tína persónligu litviftu við 40 litum!
tína persónligu stílbók, 63 síður um tíni bestu snið á klæðum!
tínar bestu smykkir, brillir, hársnið, hattar o.a.

Eisini lærir tú at leggja make-up í røttum litum

Bæði til einstaklingar og bólkar · Fyrilestrar · Quicktestir í klæðnahandlum

LIT&STÍL
Lydia Petersen · Hamarssnið 22 · 700 Klaksvík · tlf. 456831 & 271238